New Holland Grand Prix 2007:

# OK Heilsøla ynskir Birgiri tillukku



*Birgir Bærentsen hevur luttikið í New Holland Grand Prix 2007 við sera góðum úrsliti*



*Frá hátíðarhaldinum í Italia. Birgir Bærentsen er nummar fýra frá vinstru*

**Føroyski maskinførarin Birgir Bærentsen hevur luttikið í »New Holland Grand Prix 2007«. Tað er italska traktor- og gravimaskinuverksmiðjan New Holland Construction sum skipar fyri heimsmeistaraskapi fyri maskinførarar**

Í hesum sambandi skipaði New Holland umboðið í Danmark, Bay Christensen A/S, fyri semifinaluni fyri maskinførarar í Norðurevropa í døgunum 27.- 28. september.

Kappast varð við hesum maskinum: New Holland W190B (17 tons gummiged, New Holland E215B (22 tons gravimaskina) og New Holland B115 (rennugravari).

Birgir Bærentsen, sum er maskinførari hjá J.K. Petersen, var við í semifinaluni og kappaðist ímóti 12 øðrum úr Norðurlondum. Hann bleiv nr. 3 og kom víðari til heimsmeistaraskapið í Italia sum var í døgunum 12. –13. oktober.

Av teimum tilsamans 42 finalistunum bleiv Birgir nr. 13, og Norðurevropeiski bólkurin hann var í, bleiv hann nr. 3. Ein týskari bleiv nummar eitt øllum finalistunum.

Italska verksmiðjan New Holland er ein av heimsins størstu framleiðarum av landbúnaðar og entreprenørmaskinum, sum verða seldar av 11.500 umboðum í 160 londum.

Í Føroyum er tað Sp/f O.K. Heilsøla í Hvalvík, sum umboðar New Holland Construction.

Fyritøkan ynskir Birgiri Bærentsen tillukku við sera góða úrslitinum.

sp/f
O.K.
HEILSØLA & MASKINUR
FO 430 Hvalvík • Tel. 422394

# Sergjørdir bilar til allan tungan flutning



*Ferðafólk uttan fyri Hotel Geyti, sum enn er á kaiøkinum í Kollafirði, og fyrsti bilurin*



*P/F I.R. Lastvognar hava sergjørdar bilar til allan tungan flutning. Her er uppgávan at flyta ein tyrlu av verjuskipinum, sum liggur á Sundi, vestur á Flogvøllin*

**P/F I.R. Lastvognar í Kollafirði er ein av gomlu flutningsfyritøkunum í landinum**

Fyritøkan hevur røtur heilt aftur til tíðina, tá Christian Geyti búsetti seg á Langasandi í Kollafirði fyrst í 20-unum og byrjaði við hotelvirksemi, sum síðan førdi til tænastuvirksemi innan flutning av fólki og vøru.

Hetta virksemið yvirtóku eftirkomararnir við m.a. Menning Geyti, sum helt áfram við flutningi av vøru og fólki. Til hetta virksemið hevði hann bæði lastbilar og persónbilar.

Í 1970 tók næsta ættarliðið við, tá Bergtóra og Ian Rasmussen yvirtóku virksemið eftir Menning Geyti.

Enn í dag er virksemið hjá fyritøkuni á økinum og ognunum, har Christian Geyti byrjaði sítt virksemi við fyrst í 20-unum. Fyritøkan hevur í dag 15 bilar, og eru tað børnini sum reka fyritøkuna.

Fyritøkan fæst við allan flutning av t.d. bingjum (bilar við síðulyftara), maskinum (blokkvognar) og bilum til asfalt, skerv og grót umframt annan serflutning.

I.R. Lastvognar P/f • Inni í Firði 119
FO 410 Kollafjørður
Tlf. 421123 • Fax 421366